## Sands Skúli

# Lærarar

Lýst verður eftir 2 lærarum til tíðaravmarkað starv skúlaárið 2007/2008 vegna avlopstímar og niðursetta tíð.

Tað eina starvið er fulla tíð, og hitt er uml. 12 tímar um vikuna.

Endaliga tímatalið verður sett í september.

**Søkt verður eftir lærarum sum m.a.:**

- Undir ábyrgd leiðslunar og í samstarvi við lærarar skúlans taka lut í dagliga virksemi skúlans
- Eru fús at taka á seg tær uppgávur og avbjóðingar, ið eru á skúlanum.
- Eru við til áhaldandi at menna skúlan.
- Duga at samstarva.
- Kunnu átaka sær: ábyrgd av bókasavni, ítrótt/svimjing, danskt, enskt, heimstaðarlæru og telduundirvísing. Allar lærugreinar eru hjá 1. – 5. flokki.

**Førleikakrøv:**
Tey, ið sett verða, skulu helst hava læraraútbúgving.

Starvið verður lønt eftir avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokki 18,1 – 27,4.

**Umsóknir:**
Umsóknir við viðmælum, avrit av prógvum o.ø. skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi hósdagin 26. juli. kl. 12.00.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlaleiðaran, Kristian Højsted á telefon 361623 ella 252854.

**Sands Skúli**
**210 Sandur**

MIÐVÁGS-SANDAVÁGS SKÚLI



# Varaskúlastjóri

Starvið sum varaskúlastjóri í Miðvágs-Sandavágs skúla verður lýst leyst til setan frá 1. august 2007.

**Søkt verður eftir varaskúlastjóra, sum**

- undir ábyrgd skúlastjórans og í samstarvi við hann, starvsfólk og samstarvspartar skúlans annars skal taka lut í fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðslu og virksemi skúlans
- dugir at samstarva, er virkisfúsur og fyrikomandi
- er fúsur at taka við avbjóðingum og broytingum og taka á seg uppgávur í samstarvi og eftir fyriskipan skúlastjórans
- leggur dent á stundvísi, nærlagni, fakliga og námsfrøðiliga menning.

**Harumframt skal varaskúlastjórin**

- vera næsti medarbeiðari skúlastjórans og saman við honum átaka sær fyrisitingarliga ábyrgd
- undir fráveru skúlastjórans hava ábyrgdina av leiðslu skúlans
- vera førur fyri at loysa trupulleikar
- saman við skúlastjóranum skapa virðing fyri skúlanum og umstøður hjá tí einstaka fyri medávirkan og medábyrgd

**Førleikakrøv**
Umsøkjarin skal hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og satanartreytir**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið og verður sett sum sáttmálasett starv, uttan so, at tann, ið sett/ur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu verða skúlastjóranum í hendi **í seinasta lagi mánadagin 23. juli 2007 kl. 16.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlastjórans á tlf 33 23 18 - 21 88 20 teldupostur mss@skulin.fo.

**www.skulin.fo/mss**

VINNUMÁLARÁÐIÐ
KT-FYRISITINGIN

## Søkt verður eftir fulltrúa til KT-verkætlanir

Vinnumálaráðið søkir eftir einum fulltrúa til KT-verkætlanir í KT-fyrisitingini.

KT-fyrisitingin tekur sær av kunningartøkniligari samskipan innan landsfyrisitingina sum heild, harímillum at seta verkætlanir í gongd innan KT-økið.

Starvið:
Verkætlanar-fulltrúin skal stjórna, samskipa og leggja til rættis KT-verkætlanir hjá landsfyrisitingini sum heild, umframt at kunna aðalráð og allar stovnar um KT- verkætlanir.

Talan er um eitt starv í eini rættiliga nýggjari fyrisiting, og skal tann sum settur verður, tola møguligar broytingar í starvsinnihaldinum.

**Førleikakrøv:**
Vit vænta okkum av umsøkjarunum, at teir hava:

- Viðkomandi hægri útbúgving
- Kunnleika og royndir við EDV verkætlanum og almennari ella privatari fyrisiting
- Góð samstarvsevnir
- Hollan kunnleika til føroyskt, danskt og enskt.

**Vit bjóða:**
Vit bjóða eitt fjølbroytt, spennandi og avbjóðandi starv í einum umhvørvi á høgum fakligum stigi, ið tú sjálv/sjálvur verður við til at skapa. Til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi við nógvum samskifti úteftir. Fjølbroyttar arbeiðsuppgávur, har tú fert at arbeiða í tøttum samstarvi við politisku myndugleikarnar, áhugabólkar í samfelagnum og starvsfólkini hjá landsfyritøkuni. Góðar møguleikar fyri skeiðum og eftirútbúgvingum.

**Setanartreytir:**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi yrkisfelag. Setanin umfatar Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt onnur aðalráð.

**Umsóknir:**
Umsóknir við prógvum, CV o.ø. skulu sendast til:

**Vinnumálaráðið**
Tinganes
Postsmoga 377
110 Tórshavn

Umsóknir skulu vera Vinnumálaráðnum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 1.aug 2007. Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til Arna Poulsen tlf. 356070

FAROE LAW

Faroe Law bjóðar heimligar og altjóða loysnir

*Tosið við:*

**Eyðfinn Jacobsen advokat**

**Jens Wang advokat**

Tróndargøta 19
P.O.Box 158
FO-110 Tórshavn
tel 359 900 - fax 359 901
mobil 219 902 - 219 903
faroe-law@faroe-law.fo

www.faroe-law.fo

Sosialurin

Sosialurin Sosialurin i

Gravarhjálp

Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn

Tel 311723 - 511723 · Fax 321722
www.gravarhjalp.net

Sosialurin 341800